# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Útlát og oljuvinna

Herfyri samtykti løgtingið at taka undir við at skerja útlátið av veðurlagsgassum við í minsta lagi 20% og heitt varð á landsstýrið um at fáa hetta við í avtalu, sum skal gerast í Keypmannahavn.

Nú ger tingmaðurin Bjarni Djurholm í fyrispurningi til landsstýriskvinnuna, sum luttekur á veðurlagsstevnuni vart við, at um landsstýriskvinnan einvegis fær henda niðurskurð staðfestan á COP15, kann tað fáa álvarsligar avleiðingar fyri møguligari oljuvinnu í føroyskum sjóøki.

Tingmaðurin, sum í fleiri ár var oljumálaráðharri og tí eigur vita, hvat hann tosar um, sigur, at samanborið við útlátini frá oljuleiðum á okkara leiðum kann roknast við, at møgulig olju/gass-framleiðsla frá eini oljuleið í okkara sjóøki fer at hava árligt útlát uppá uml. 200.000 tons CO2, sum er meira enn samtykti niðurskurðurin hjá Føroyum fram til 2020.

Verður løgtingssamtyktin einvegis staðfest í Keypmannahavn fríggjadagin, uttan ískoyti um undantak, kann løgtingssamtyktin tí gerast álvarssom forðan fyri olju/gassframleiðslu á føroyskum øki sigur Bjarni Djurholm.

Hóast Innlendismálaráðið og flokkarnir á tingi í viðmerkingunum staðfestu, at møguleikarnir at menna eina framtíðar oljuvinnu ikki skuldu verða skerdir, so vóru hesi viðurskifti als ikki umrødd í sjálvum uppskotinum til samtyktar ella í álitinum frá rættarnevndini.

Tingmaðurin spyr tí, um landsstýriskvinnan fer at fylgja einvegis løgtingsamtyktini viðv. uppskotinum til samtyktar um at skerja føroyska útlátið av veðurlagsgassum? Hann vil eisini hava at vita, hvussu avtaluteksturin, sum landsstýriskvinnan hevur við sær á COP15, ljóðar og hvørji fyrivarni eru til avtalutekstin, tá um olju/gassframleiðslu á føroyskum øki ræður?

Loksins verður spurt: Finna vit olju/gass, hvussu ætlar landsstýriskvinnan at tryggja, at vit kunnu minka 20% ásetingina av útlátinum (sum svarar til árliga útlátið á einari oljuleið í okkara nærumhvørvi), so møguleikarnir at menna framtíðar oljuvinnu ikki verða skerdir?

Hetta eru ítøkiligir spurningar, sum landsstýriskvinnan vónandi hevur ítøkilig svar uppá. Flestu okkara eru samd um, at vit skulu vera partur av royndunum at skerja útlátið. Hinvegin má slík samtykt ganga hond í hond við tær ætlanir vit hava við eini oljuvinnu. Tað ber ikki til at gera avtalur við altjóða oljuvinnu um milliardaíløgur fyri at finna kolvetni í føroysku undirgrundini, samtundis sum vit vilja vera við í avtalu, sum forðar fyri at taka oljuna og gassið upp úr somu undirgrund.

Fiskivinnan er svikalig. Vit síggja, at hon einsamøll megnar ikki at halda vælferðarsamfelagnum koyrandi. Tí mugu vit troyta annað tilfeingi, um tað finst her. Og her eru kolvetni eitt tílíkt tilfeingi. Sjálvandi skulu vit gera alt vit eru ment, um vit finna kolvetni, at hesi dálka sum minst. Og gerast tey ein stór inntøkukelda, eigur partur av vinninginum at fara til at menna varandi orkukeldur, sum dálka minni.

Vónandi hevur landsstýriskvinnan hetta við í skáttuni í Keypmannahavn og gevur gætur, at júst nú hevur annar landsstýrismaður sett stjóra fyri Jarðfeingi, sum stílar fyri oljuleitingini.

**Sosialurin**

## Sláið tvær flugur við einum smekki- hækkið rúsdrekkaprísin!

JENIS AV RANA



Miðfloksins vegna floksformaður

Við at hækka prísin á rúsdrekka verður óneyðugt við eykajáttan úr landskassanum, og samstundis fáa nógvar føroyskar familjur eina góða jólagávu frá landsstýrinum.

Hósdagin bar fíggjarmálaráðharrin uppskot í Løgtingið, har landsstýrið biður tingmenn játta eyka pening til rúsdrekkasøluna - kr. 1,5 mió. Fleiri orsøkir sigur hann eru til undirskotið, sum krevur hesa hækkan, men sjálvandi vita vit øll, eisini samgongulimir, at orsøkin til undirskotið er ov lágir prísir! Til teirra, sum siga at orsøkin er krav landsins at rúsan gevur yvirskot, er at siga, at rokna vit útreiðslur landsins av rúsdrekkaávum (tvs. sjúkur, skaðatilburðir, óarbeiðsføri v.m, v.m. v. m.), so skyldar rúsdrekkasølan landskassanum risaupphæddir!

Seinasta árið hava løgtingspolitikarar tíverri samtykt eina sparing fyri og aðra eftir á øki teirra veikastu. Hava álagt teimum, ið lítið hava frammanundan at gjalda enn meira. Tann skommin má ikki henda, at hesi, nú stundar til jóla, fara at síggja hendan pening sín fara beinleiðis til figging av rúsdrekkasølu!

Áheitan Miðfloksins á landsstýrið er at taka aftur umsóknina um eykajáttan til rúsuna. Harvið fær leiðsla teirra greiðu boðini, at manglandi peningurin skal finnast við at hækka prísir. Rætta løtan er júst nú, áðrenn jólasølan byrjar, tí harvið tálma vit eisini søluni (kanningar vísa jú týðuligt samband millum prís og nýtslu). Ein slík avgerð vil geva mongum føroyskum familjum kærkomnu jólagávuna, eina rúsfría jólahøgtíð.

## Varðveita 10. flokk í Kommunuskúlanum

LAILA Í DALI

9. d í Kommunuskúlanum (fyrrverandi næmingur í Sankta Frans Skúla)

Sankta Frans næmingar: Á hvørjum ári koma tað, aftan á summarfrítíðina, tveir flokkar úr Sankta Frans skúlanum í 8. flokk í Kommunuskúlanum, tí sjeynda, og harvið síðsta árið í Sankta Frans er liðugt.

Teir flokkarnir, sum í ár fluttu úr 7. flokki í Sankta Frans til 8. flokk í Kommunuskúlanum, og teir, sum fluttu fyri einum ári síðani og nú ganga í 9. flokki, føla at tað er ov nógv kravt av teimum psykiskt.

Tey, ið ætla sær at ganga sítt triðja ár í Kommunuskúlanum - tað vil siga sítt tíggjunda ár – verða biðin um aftur at flyta til eitt heilt nýtt umhvørvi – nemliga til Eysturskúlan. Tað er ikki lætt at flyta frá einum staði í eitt annað, eitt stað man er á 200 dagar um árið. Man má koma at læra og venja seg við lukt, arbeiðshátt, næmingar, lærarar o.s.fr. á hvørjum staði. Henda flytingin kann næstan samanlíknast við, tá ið eitt barn skal flyta familju tríggjar ferðir uppá tíggju ár.

Eg vóni innarliga, at tað ikki verður hugsað: »Gott er, tað gongur bara út yvir nakrar fáar flokkar.« Men eitt, sum kanska ikki verður hugsað um er, at flokkarnir hava næmingar. 20 til 25 næmingar eru í hvørjum flokki, so umleið 200 ungar sálir kunnu finna seg í at føla seg týdningarleys í hesari kommunu, tí tað tykist, sum teirra meiningar ikki verða virdar í býráðnum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13.30

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.